# Avleiðingar av at skerja granskingina




*Tveir av granskingarleiðarunum, Bjarti Thomsen, sum tekur sær av menning av reiðskapi, og Hóraldur Joensen, sum er granskingarleiðari fyri biotøkni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Í grein á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, roynir skrivstovan at lýsa nakrar av avleiðingunum, sum standast av, at játtanir til gransking og menning verða skerdar**

GRANSKING/ MENNING

Vinnuhúsið kemur til hesa niðurstøðu um skerjingar innan gransking og menning:

Í álitinum frá fíggjarnevndini viðvíkjandi fiskivinnuroyndum, vísir nevndin á, at til ber at minka innanhýsis flytingar millum almennar stovnar. Slíkar innanhýsis flytingar fær nevndina at ivast í, um upphæddin, ið løgtingið játtar á ávísum kontum, eru missvísandi. Nevndin metir samstundis, at játtanin til fiskivinnuroyndir í nógv størri mun skal nýtast til veruligar fiskivinnuroyndir.

Verkætlanir, sum vóru játtaðar til fíggjarárið 2003 og sum halda fram í 2004, vera íalt 2,2 mió. kr. Av hesum eru uml 1,7 mió. til almennar stovnar. Tað vil við øðrum orðum siga, at skerjingin á fíggjarlógini ikki vil minka um % vísa partin, sum verður játtað til almennar stovnar í 2004, men tann partin, sum er eftir til vinnuna.

Ráfiskakeyparafelagið og Ráfiskaseljarafelagið hava saman við Menningarstovuni søkt um pening til at menna eitt benchmarking-amboð til fiskivinnufyritøkur. Henda verkætlanin vil detta niðurfyri. Verkætlanir at kanna fiskidagaskipanina og skipaninar við stongdum leiðum og friðingum, steðgar upp.

Tað er harmiligt vitandi um tann stóra áhuga, sum fiskidagaskipanin hevur frá øðrum fiskiveiðutjóðum og rákið við umhvørvismerking, har keyparar av okkara fiskavørum vilja hava skjalprógv fyri, at fiskiskapurin við Føroyar er burðardygt umsitin. Vit hava onga vitan um hesi viðurskifti í løtuni.

Tær verkætlanir, sum m.a. Fiskirannsóknarstovan ger, verða oftast gjørdar í samstarv við vinnuna, t.d. verða skip leigaði til fiskivinnuroyndir. Almenni stovnurin (Fiskirannsóknarstovan/ Menningarstovan/ Heilsufrøðiliga starvsstovan) fyrisitir verkætlanina, men játtani fer til keyp av vørum og tænastum m.a. frá vinnuvirkinum, sum er við í verkætlanini, t.d. skipinum, sum verður leigað til royndina, og tað er vinnan sum fær ágóðan av úrslitunum.

Peningurin kundi eins væl verið útgoldin til vinnuvirkið, sum er við í verkætlanum, sum so síðani kundi keypt vørur og tænastur til verkætlanina m.a. frá einum almennum stovnið (lab.royndir), men so mugu hesar fyritøkur sjálvar fyrisita verkætl-anina. Hetta meta fyritøkurnar seg mangan ikki hava orku til og tað er nógv lættari fyri tær at t.d. almennur stovnur tekur sær av hesum.

Fyri fáum árum síðani (1999) fór meginparturin av pengunum, sum vóru játtaðar til fiskivinnuroyndir til almennar stovnar. Vinnan var næstan ikki umboða í umsøkjaraskaranum. Fiskimálaráðið hevur seinastu árini lagt stóran dent á at fáa samskipa granskingina innan fiskivinnugeiran og at fáa hesa granskingina at hava støði í tí, sum vinnan hevur tørv á at fáa gjørt. Hetta arbeiði tekur tíð og tað er ikki fyrr enn nú at úrslitini byrja at síggjast.

Játtanin til Granskingarætlanir verður skorðin 400.000 kr. Hetta er peningur ætlaður til rakstur av granskingarkjarnunum innan biotøkni, framleiðslutøkni og veiðutøkni. Peningurin er beinleiðis ætlaður til at knýta sambond í Norðurlondum, sum kunna viðvirka til, at føroyingar sleppa við í verkætlanir, sum verða fíggjaðar uttanlands av norðurlendskum grunnum m.a. Hetta arbeiði verður munandi skert, sigur Vinnuhúsið í greinini um skerjingarnar.

Tað sá bjart út:

# Granskarar og vinna hond í hond

GRANSKING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskivinnugransking er ein skipan hjá Fiskimálaráðnum, sum umsitur játtaninar til Fiskivinnuroyndir og Granskingarætlanir.

Ein stýrisbólkur, sum er samansettur av fólki úr vinnuni og almennum stovnum við tilknýti til vinnuna, stendur aftanfyri Fiskivinnugranskingina. Stýrisbólkurin skal á hvørjum ári lata landsstýrismanninum í fiskivinnumálum tilmæli um, hvussu peningurin til fiskivinnuroyndir skal nýtast. Bólkurin hevur eisini ábyrgd av sonevndu granskingarkjarnunum mótvegis Fiskimálaráðnum.

Ásmundur Guðjónsson hevur vegna stýringsbólkin verið samskipari av fiskivinnugranskingini, men hann er nú farin í annað starv og annar granskingarsamskipari er settur.

Eftirmaðurin er Marita Rasmussen.

## Tríggjar kjarnur

Tríggjar sonevndar granskingarkjarnur eru settar á stovn við trimum granskingarleiðarum; Hóraldi Joensen (biotøkni), Bjarta Thomsen (veiði-og reiðskapstøkni) og Helga Nolsøe (framleiðslutøkni).

Hóraldur hevur skrivstovu á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, meðan Bjarti og Helgi hava sínar skrivstovur á Fiskirannsóknarstovuni. Allir tríggir arbeiða tó burtur av við fiskivinnugransking.

At granskingarkjarnurnar verða hýstar av og byggja á verandi og hóskandi karmar í almennum stovnum, merkir, at komast kann skjótt í gongd við granskingini. Væntandi er eisini, at við hesum fæst eitt mennandi samstarv við vertsstovnin – stovnin, har skrivstovan hjá granskingarleiðaranum er.



*Osmund Guðjónsson var maðurin, sum vegna Fiskimálaráðið legði lunnar undir Granskingarætlanina*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Kjarnurnar hava til endamáls at byggja upp vísindaligan førleika, sum er viðkomandi fyri vinnuna. Hetta verður gjørt við at luttaka í og skipa fyri verkætlanum í samstarvi við fiskivinnuna og granskingarstovnar her heima og uttanlands. Á henda hátt skulu kjarnurnar mennast og fáa fleiri granskarar knýttar at sær.

Tað er Fiskimálaráðið, sum setur leiðararnar fyri granskingarkjarnurnar. Til hvørja kjarnu er knýtt ein programnevnd við granskarum og fólki úr vinnuni. Hesi verða saman við granskingarleiðaranum við til at stinga út í kortið, hvat virksemið í kjarnuni skal umfata.






